BankNordik: Ummælisskriv til uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)

BankNordik tekur í høvuðsheitum undir við lógaruppskotinum og tekur somuleiðis undir við endamálinum við lógaruppskotinum, at tryggja, at Føroyar viðvirka í altjóða stríðnum móti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

BankNordik hevur í hesum sambandi nakrar viðmerkingar til lógargreinar í uppskotinum:

Viðvíkjandi kundakunnleikamannagongdir í samband við veruligum eigarum
Í lógaruppskotinum verður lagt upp til, at § 9, stk. 1, nr. 1 skal broytast soleiðis, at greinin fer at ljóða soleiðis:

"… tey stovna eitt kundasamband, týðandi umstøður broytast hjá einum kunda, og annars hóskandi tíðir, *heruppí tá fyritøkan ella persónurin í viðkomandi álmanakkaárinum løgfrøðiliga hevur skyldu til at seta seg í samband við kundan við tí fyri eyga at kanna eina og hvørja viðkomandi upplýsing viðvíkjandi tí ella teimum veurligu eigarunum,"* [skákskrift er nýggja ásetingin]

Við hesari broyting verður tað soleiðis álagt fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin), hereftir kallað Hvítvasklógin, eitt nýtt tíðarskeið at skula fremja kundakunnleikamannagongdir fyri sínar vinnukundar, sum áður ikki hevur verið umrøtt í Hvítvasklógini.

Hendan greinin er eisini galdandi í donsku hvítvasklógini, og stendur í notunum til hesa grein, at hendan broytingin er fyri at fremja 5. hvítvaskdirektiv art. 1, stk. 1, nr. 9, litra b. Sambært notunum til donsku hvítvasklógina, sum er § 10, stk. 1, nr. 1, skulu fyritøkur og persónar fremja kundakunnleikamannagongdir, tá ið tey annars í einum kalendaraári, hava eina *løgfrøðiliga skyldu* at eftirkanna upplýsingarnar um veruligu eigararnar. Metingin, at hava eina løgfrøðiliga skyldu er, eftir notunum til greinini at skilja soleiðis, at hetta er ein skylda, sum skal verða áløgd við reglum, ið eru settar í verk sambært eini lóg.

Í Føroyum eru ávís feløg áløgd at skráseta veruligir eigarar, sambært kunngerð nr. 5 frá 19. januar 2022 um skráseting og almannakunngering av upplýsingum um eigarar í vinnufyritøkum í kt-skipan Skrásetin Føroya. Í Hvítvasklógini, er tó eingin ásett skylda hjá fyritøkum ella persónum fevnd av hesi lóggávu, at á sama hátt árliga at kunna tryggja, at upplýsingar, sum persónar hava skrásett um veruligu eigarar hjá kundunum, eru dagførdir.

Tískil hevur henda broyting av § 9, stk. 1, nr. 1, onga veruliga týdning, og er hetta eisini tað, ið stendur skrivað til somu grein í galdandi hvítvasklóg í Danmørk.

Tilmæli 1: Mælt verður til, at henda broytingin ikki verður framd fyrr enn tað er álagt fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, at veruliga uppfylla hesa skyldu.

Viðvíkjandi fráboðanarskyldu í § 14 a
Sambært § 14 a í lógaruppskotinum, verður nú álagt fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, at boða Skráseting Føroya frá, um tað, ið er skrásett hjá Skráseting Føroya ikki er í samsvar við tað, ið er skrásett hjá fyritøkunum og persónunum, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, og er hetta ein nýggj fráboðanarskylda.

Umframt omanfyristandandi er eisini ein broyting til § 13, stk. 1, 2. pkt. í lógaruppskotinum, og verður tað her kravt, at í samband við, at eitt handilssamband verður byrja við eitt felag ella aðra løgfrøðiliga eind ella ein trust ella líknandi løgfrøðiliga skipan, sum hevur skyldu til at skráseta upplýsingar um veruligar eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya, so skulu fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, innsavna avrit av upplýsingunum skrásettar hjá Skráseting Føroya og skulu hesar upplýsingar goymast.

Tað er nærliggjandi at hava í hugað, at óansæð, at summar fyritøkur longu hava skyldu at skráseta veruligar eigarar hjá Skráseting Føroya, mugu vit ásanna, at henda skyldað ikki verður hildin til fulnar. Tískil er sera týdningarmikið, at fráboðanarskylda í § 14 a, ikki verður sett í verk áðrenn at grundarlagið fyri fráboðanini er so fullfíggjað sum gjørligt, so at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, hava eina skráseting at samanbera við.

Tilmæli 2: Mælt verður til, at § 14 a, fyrst fær veruliga virknað, tá ið feløg, ið hava skyldu at skráseta veruligu eigarar, halda hesa skyldu, so fyrtiøkur, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, hava upplýsingar at samanbera við.

Viðvíkjandi upplýsingar um persónar, ið eiga fastogn í Føroyum
Sambært lógaruppskotinum verður ein nýggj grein sett í gildi við § 29 a og verður her greitt frá, at "Hvidvasksekretariatet og aðrir málførir myndugleikar eftir hesi løgtingslóg, skulu hava atgongd til upplýsingar, sum gera tað møguligt rættstundis at eyðmerkja allar likamligar og løgfrøðiligar persónar, ið eiga fastogn í Føroyum".

Tað er ikki nágreinað í lógaruppskotinum, um hetta eru upplýsingar, ið fyritiøkur og persónar, ið eru fevnd av Hvítvasklógini skulu lata Hvidvasksekretariatet og aðrir málførir myndugleikar, ella um hetta bert er ein generel áseting um, at hesar upplýsingar skulu verða tøkar.

Endmálið við hesari áseting skilst, sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið, at verða, at tað skal gerast møguligt hjá viðkomandi myndugleikum at síggja hvør persónur eigur fastogn í Føroyum. Soleiðis sum tað er skipað nú, lýkur hetta ikki hesi krøv, tí tað bert ber til at kanna ognarviðurskiftir fyri ognir hvør í sær, og verður við hesari grein sipað til eini størri skipan, sum ikki er ment enn fyri Føroyar.

Um ætlanin er, at hesar upplýsingar skulu latast av fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av Hvítvasklógini er neyðugt, at nágreinuliga eyðmerkja hvussu hesar upplýsingar skulu latast og til hvørja freist. Sambært lógaruppskotinum verður nevnt "rættstundis", og kann hetta tí tulkast sum skjótt.

Tilmæli 3: Mælt verður til, at tað verður greitt nærri frá hvussu henda skylda skal lúkast, fyri fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av Hvítvasklógini.

Tilmæli 4: Mælt verður til, at fráboðan um slíkar upplýsingar verður framt á ein tryggan og nemman hátt, so tað er gjørligt hjá fyritøkum og persónum fevnd av Hvítvasklógini, at senda inn neyðugu upplýsingarnar uttan forðing.

Viðvíkjandi § 34 a
Sambært viðmerkingunum til einstøku greinirnar í lógaruppskotinum verður skrivað, at í núverandi Hvítvasklóg, er eingin áseting, har tað beinleiðis verður álagt at fráboða nevnd ella dagligu leiðsluni í einari fyritøku ávaringar um hvítvask ella fígging av yvirgangi. Hetta verður tó broytt nú í hesum lógaruppskotið, við at seta í verk § 36 a.

Í lógaruppskotinum er hetta tó skrivað sum § 34 a og ikki § 36 a, ið snýr seg um tagnarskyldu hjá starvsfólki, ið virka innan almennu umsitingina.

Óivað kemst hendan íblanding av, at hetta er nevnliga skrivað í § 36 a í donsku hvítvasklógini eins og tað eisini er § 36 a í lógaruppskotinum fyri Hvidvaskloven, ið er galdandi fyri ikki heimtikin málsøkir.

Tilmæli 5: Mælt verður til, at tað í viðmerkingunum verður broytt soleiðis at víst verður til § 34 a.

Viðvíkjandi fyrningarfreist og fyrrverandi starvsfólk
Núverandi fyrningarfreist hevur verið 5 ár, og hevur fyrningarfreistin verið galdandi í § 59. Við hesum lógaruppskotið verður stk. 5 nú útbygt við møguleika fyri, at fyrningarfreistin verður 10 ár, um brot er á greinum, ið eru nevnd í § 59, stk. 5.

Eftir hesum at døma, verða allar greinir viðvíkjandi kundakunnleikamannagongdir, herd kundakunnleikamannagongdir eins og skráseting av illgrunum og fráboðanunum til Hvidvasksekretariatet fevnt av § 59, stk. 5 og brot á hesar, verður mett at verða so mikið álvarsamt, at fyrningarfreistin verður 10 ár, ístaðin fyri 5 ár.

Vanliga hevur verið, at fyrningarfreistin hevur verið 5 ár, eins og at tað í § 29, stk. 2, hevur verið álagt fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av Hvidvaskloven, at goyma upplýsingar, skjøl og skrásetingar í minsta lagið 5 ár eftir, at eitt kundasamband er steðgað.

Henda broyting í lógaruppskotinum fer tískil at hava við sær, at allar fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, fara at meta tað verða neyðugt at goyma upplýsingarnar í minsta lagið so leingi, sum fyrningarfreistin í § 59, stk. 5 er galdandi, sum við hesum lógaruppskotið verður 10 ár.

Avbjóðing verður tann, at fyritøkur og persónar fevnd av Hvítvasklógini, væntandi ikki hava upplýsingar um fyrrverandi kundasambond í meir enn 5 ár aftur í tíð, og verður hendan broytingin, um hon verður sett í

gildi alt fyri eitt og uttan tillagingar, møguliga sera álvarsom, um tað skuldi hent seg, at tað varð mett at ein fyritøka ella persónur hevði forbrotið seg móti § 59, stk. 5.

Samstundis sum at fyrningarfreistin verður longd til tað dubulta, verður í lógaruppskotinum eisini tikið til, at hvørja ferð at "starvsfólk" stendur, verður skoytt uppí "*fyrrverandi starvsfólk*". Hetta er eisini at meta sum ein herðing av greinunum í Hvítasklógini, og fevnir hon nú ikki bert um starvsfólk, men eisini fyrrverandi starvsfólk, ið eru farin úr starvi.

Tilmæli 6: Mælt verður til, at hædd verður tikið fyri, at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av Hvítvasklógini, væntandi ikki hava upplýsingar fevnt av § 59, stk. 5, goymdar fyri fyrrverandi kundar, orsaka av at fyrningarfrestin og kravið um at goyma skjøl í § 29, stk. 2, hevur verið 5 ár. Tískil verður mælt til, at tað verður eitt tíðarskeið, har fyrningarfreistin stigvíst verður longd 1 ár, fyri hvørt ár, ið fer, til hon veðrur 10 ár, sum nevnt í § 59, stk. 5.